


[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 08 - 10 - 2012

# Sviar vilja vita meira um føroyskan fótbólt og oljuna

Tað er við tíðini vorðin ein sannroynd, at føroyska fótbóltslandsliðið dregur sum ein magnetur. Eru Føroyar vegna sína náttúru, mentan og fisk ókendar í umheiminum, so eru tær tó vælkendar sum ein av heimsins minstu fótbóltstjóðum, ið bjóðar teimum stóru av. Fríggjadagin spæla Føroyar og Svøríki á Tórsvølli og hevur dysturin fingið svenskar miðlar at senda síni fólk til Føroya. Sveriges Radio Sviar, sum kenna lítið og einki til Føroyar, vilja nú vita meira um lítlu tjóðina í Norðuratlantshavi, royndirnar at finna olju og fáa meira sjálvstýri og ikki um føroyskan fótbólt. Henda sannroynd er orsøkin til, at Sveriges Radio hevur sent eina av sínum tíðinadakvinnum til Føroya. At Jenny Sanner Roosqvist er komin til Føroya júst hesa vikuna, hevur fyrst og fremst samband við komandi HM undandystin millum Føroyar og Svøríki, sum stórur áhugi er fyri í Svøriki og Føroyum. Men vitjanin fevnir so eisini um leitingina eftir olju, sum fer fram í løtuni. Jenny Roosqvist vitjaði á skrivstovuni hjá oljan.fo í morgun fyri at verða kunnað um aktuellu boringina á landgrunninum og annars um føroysku oljutilgongdina. Forelskað í Føroyum Hon viðgongur, at sviar sum heild vita alt ov lítið um Føroyar. Hetta er mín fyrsta ferð til Føroya, og eg eri longu vorðin forelskað í landinum, sigur Jenny, sum aleina byggir hetta á busstúrin úr Vágum til Havnar. Gud vitið, hvussu eg havi tað, tá eg havi verið her í eina heila viku og upplivað fólkið og landið, leggur hon brosandi aftrat. Hon umsitur Norðurlond og Baltisku londini fyri Sveriges Radio og heldur til í finska høvuðsstaðnum, Helsinki. Evnini hon viðger eru mong og fjølbroytt, alt frá búskapi, mentan til ítrótt. Og hon dylur ikki fyri, at ein HM undandystur móti Føroyum er nakað, sum vekir stóran ans í øllum Svøríki. Okkara fótbóltslandslið hevur stóran týdning fyri svenska samleikan, og tí hevur tað alstóran týdning, at vit klára okkum væl í undandystunum til HM og Føroyum mugu vit vinna á , sigur Jenny Roosqvist,

sum tó viðgongur, at sviar ikki meta dystin fríggjadagin sum nakra lætta uppgávu. Kirkjubø og Kollafjørð Umframt fótbólt, har hon fer at tosa við føroyska landsliðvenjaran og spælarar og áskoðarar, fer hon eisini at gera sendingar um oljuna, Ríkisfelagsskapin og føroyska mentan. Hon hevur nógv á skránni. Umframt at hitta løgmann og formannin í Tjóðveldi ætlar hon sær eisini til Kirkjubøar at uppliva søguna og mentanina har og eisini til Kollafjørð at fáa innlit í makrelævintýrið. Myndir - Jenny Roosqvist á vitjan hjá FOÍB í Havn.